

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 11 - 2011

# Oljuinnrás á Hotel Tórshavn

Tað var av sonnum oljuinnrás á Hotel Tórshavn á middegi, tá norska frálandafyritøkan Bourbon Offshore Norway bjóðaðu føroyingum til framløgu um virksemið hjá fyritøkuni á øllum heimsins høvum. Åge Bjerkvik, manningarsamskipari hjá fyritøkuni var sum tikin á bóli, tá hann gjørdi seg kláran fyrrapartin at taka ímóti føroyingum, sum hava áhuga fyri at fáa arbeiði í frálandavinnuni. Teir 50 stólarnir hann hevði sett upp vóru alt alt ov lítið. Tá samanumkom høvdu nærum 200 fólk leitað sær oman á Hotel Tórshavn at lýða á, hvørjar møguleikar norska frálandavinnan hevur at bjóða føroyingum. "Vit hava nógv skip í drift og hava longu fleiri føroyingar í arbeiði. Okkum dámar sera væl føroyingar, sum eru til arbeiðis hjá okkum og síggja fram til, at fleiri teirra fara at venda sær til okkara. Fyritøkan eigur ella rekur 21 skip. Enn ein framløga skuldi vera klokkan 15 í dag. Oljan.fo var sum ikki einaferð á staðnum og fara vit í seinni grein at práta við Åge um stóru undirtøkuna. Myndir - Millum 150 og 200 førroyingar møttu upp á Hotel Tórshavn á middegi, tá norska frálandafyritøka hevði framløgu um arbeiðsmøguleikar. Åge Bjerkvik samskiparari her saman við Sjúrða Guðjónsson Dánajl í Soylu av Sandi uttast til høgru hevur arbeitt hjá norsku fyritøkuni í mong ár og hann var eisini við til framløguna. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller